Navn felagsins er "Havnar Arbeiðarafelag"

**Endamál felagsins:**

a) At fylkja allar arbeiðsmenn innanfyri omanfyri nevnda mark til í felag at virka fyri betran av livikorum teirra.

b) At fremja og menna felagsskapin og samanhaldið.

c) At virka fyri tí, at ein og hvør arbeiðsmaður roknar tað sum skyldu sína móti sær sjálvum og felagsmonnum sínum at vera limur av felagnum.

d) Við upplýsandi og upplærandi tjakfundum og fyrilestrum at royna at vekja áhuga millum limirnar fyri fíggjarligum og sosialum samfelagsspurningum.

**LIMASKAPUR**

Gr. 1

Limur kann gerast ein og hvør arbeiðsmaður og spesialarbeiðari, ið er yvir 14 ár, og um hvønn tað ikki kann prógvast, at hann hevur virkað móti arbeiðaranna áhugamálum, ella er útkoyrdur úr einari arbeiðarasamskipan, og hetta ikki seinri er fingið í rættlag. Tó skulu álitismenn og nevndarlimir ikki hava forbrotið seg móti felagnum.

Gr. 2

Limaskapurin er skipaður í bólkar, nevniliga:

a) Virkin limur.

b) Óvirkin limur (hvílandi)

a) Sum virkin limur roknast hann, sum lýkur treytirnar fyri limaskapi.

b) Sum óvirkin limur roknast hann, sum lýkur treytirnar fyri limaskapi men sum seinastu trý (3) árini ikki hevur verið í arbeiði ella arbeiðsloysis- trygging innan økið felagsins í minst eitt (1) ár samanlagt. Viðvíkjandi rættindum til felags lívstryggingarskipan felagsins eru galdandi tær til eina og hvørja tíð ásettar aðalfundarsamtyktir og ásettar tryggingartreytir millum felagið og tryggingarfelagið.

**INNLIMAN**

Gr. 3

Limurin eigur sjálvur - rættstundis - at greiða síni felagsviðurskifti.

Gr.4

Tilflytan frá øðrum plássi kann tó ikki fara fram, uttan tað kann prógvast, at fólk ikki fæst.

Gr.5

Er ivi um játtanina av eini umsøkn um upptøku ella uppafturupptøku, ella um ein limur kann verða verandi í felagnum,

verður málið viðgjørt á nevndarfundi, ið verður hildin við hesum

endamáli. -í slíkum føri krevjast, fyri at limur kann verða upptikin

ella útkoyrdur, meiriluti av atkvøðunum nevndarinnar. Limur

hevur tó rætt til atkæra avgerð nevndarinnar og krevja málið lagt

fyri fyrstkomandi aðalfund til endaliga avgerð.

Í slíkum føri krevjast fyri at limur kann verða upptikin ella

útkoyrdur helmingin av greiddu atkvøðunum. í tílíkum føri hevur

limurin talu,- men ikki atkvøðurætt.

Tílíkir limir kunnu við afturtøku verða revsaðir við sekt.

Gr.6

Í teimum førum, har talan er um upptøku av limi, ið fyrr er strokin

vegna eftirstøðu og øðrum, kann upptøka einans fara fram, um so

er, at hann hevur goldið fult limagjald fyir ta tíð ið farin er frá tí, at

eftirstøðan byrjaði og til uppafturtøkan fer fram og møguligum

útreiðslum, ið felagnum hevur verið fyri av hansara ávum. Um so

er, at tílíkur limur í hesum tíðarskeiði hevur verið fráfluttur

felagsins øki í longri tíð, verður henda tíðin ikki tikin við í

limagjaldsútrokningina. Tílíkir limir kunnu við afturtøku verða

revsaðir við sekt.

Gr.7

Limagjaldið verður ásett á aðalfundinum.

Gr.8

Frítiknir fyri at gjalda limagjald kunnu vera skúladreingir, ið ikki

hava fylt 18 ár (tó krevst arbeiðsloyvisprógv).

Øll ivamál um limaskap í hesum sambandi verða at leggja undir nevndina.

**LIMARÆTTINDI**

Gr.9

Atkvøðurætt í felagsins viðurskiftum eiga einans teir limir, sum uppfylla treytirnar fyri virknum limaskapi og hava fylt 17 ár.

Gr.10

Limur, sum sambært gr 2b gerst óvirkin kann bert varðveita síni limarættindi við umframt vanliga limagjaldið at rinda tær útreiðslur, sum felagið hevur av limaskapi hansara.
Tó skulu teir limir, ið fyltir eru 55 ár og sum hava verið limir í felagnum í ikki stytri enn 20 ár samanlagt tá henda regla verður lýst ( 1.januar 1996) varðveita øll síni gomlu limarættindi.

Gr.11

Í øllum førum, har tað stendur um ávaring til lim ella at koyra hann úr felagnum, verður honum givin heimild til at møta fram og verja sak sína yvirfyri nevndini, har avgerðin fer fram sum ásett er í reglunum í gr 5.

**LIMASKYLDUR**

Gr.12

Virkin limur av Havnar Arbeiðarafelag kann ikki vera virkin limur í øðrum vinnufelag.

b. hvørja ferð eitt arbeiði byrjar, skulu limirnir velja sær ein álitismann. Limirnir mugu ikki arbeiða saman við óorganiseraðum

fólki. Limir, ið eru í einum arbeiði - eisini akkordarbeiði - eiga ikki rætt til at ríma úr tí fyri at taka upp lossingar - ella annað arbeiði, og harvið forða øðrum arbeiðsleysum limum í at fáa arbeiði.

Brot á 2.og 3.part í hesi grein verður fyrstu ferð at viðføra eina ávaring frá nevndini. Hendir tað aftur, verður spurningurin um limaskapin hjá honum, ið brotið hevur framt tikin til avgerð á fyrsta komandi nevndarfundi, har avgerðin fer fram sum ásett í reglunum í

Gr.13

Limirnir hava skyldu til, um ósemja við arbeiðsgevarnar kemur í - misrøkt av sáttmálanum ella noktan av løngjaldan ella tílíkt - tá beinan vegin at siga formanninum frá. Arbeiðssteðgur eigur ikki at verða, uttan játtan frá nevndini, ið tá eigur at virka skjótast gjørligt.

Gr.14

Hvør ein limur er skyldugur at tiga við tí sum verður viðgjørt á felagsfundum, eftir sum allar frágreiðslur og lýsingar felagsins einans skulu koma frá nevndini. Vísir tað seg, at uttanfelagsfólk verður kunnugt við felagsins viðtøkur í stríð við samtyktina í 1.parti av hesi gr., skal tað beinan vegin verða sagt nevndini frá, og letur hon málið kanna beinan vegin -. Verður tann skyldugi limurin funnin, verður hann at revsa eftir gr 7. í lógini.

Gr.15

Limum verður álagt at møta í rættari tíð á arbeiðsplássinum og gjølla ansa eftir, at tær av felagnum ásettu arbeiðstíðir, etingartíðir og løntakstir verða hildnir, og at sýna kurteisi og siðiligan atburð móti yvirmonnum og arbeiðsfelagnum, og har við fremja felagsins trivna og framburð.

Gr.16

Felagsins viðurskifti verða stjórnað av eini stjórn við 5 limum:Formanni og 4 vanligum stjórnarlimum. Formaðurin verður valdur fyri 4 ár. Hinir stjórnarlimirnir verða valdir fyri 2 ár á aðalfundinum í Januar. Umframt verða á sama aðalfundi valdir 2 tiltaksmenn til hesar. Stjórnin velur sjálv næstformann sínamillum

Felagið verður bundið av formanni saman við 1 (einum) nevndarlimi ella av 3 (trimum) nevndarlimum.

Eisini velur stjórnin skrivara og nýtist hesin ikki at vera limur av felagnum, ella úr stjórn. Í teimum førum skrivarin ikki er limur í felagnum ella úr stjórn eigur hann ikki atkvøðurætt á felags-ella nevndarfundi. Eisini setur stjórnin kassameistara og nýtist hesin ikki at vera limur í felagnum ella úr stjórn. Setan av starvinum skal tó fyri at hava gildi, verða løgd fyri fyrsta vanliga felagsfund og verða samtykt av vanligum meiriluta. Í teimum førum, har kassameistarin ikki er limur av felagnum, eigur hann ikki atkvøðurætt á felags- ella nevndarfundi.
Ein og hvør limur er skyldugur at taka við vali til álitisstørv felagsins. Tó kann hann, ið hevur havt álitisstarv seinasta valskeið, sýta fyri at taka við endurvali til næsta valskeið. Valevni til stjórn skulu øll hava atkvøðurætt.

Gr.17

Formaðurin er orðstýrari á øllum fundum og aðalfundum, (tó kann ein annar av fundarlimunum vera valdur sum orðstýrari, um ynskist), og skal gjølla ansa eftir, at fundurin fer fram í friði og við skili, og at bert ein limur tosar í senn og skal hann, ið ynskir at fáa orðið, fyrst snúgva sær til orðstýraran um hetta, og orðið verður givið limunum í tí raði sum teir hava biðið um tað.

Í formansins fráveru kemur næstformaðurin í hansara stað; er næstformaðurin heldur ikki á fundi, tekur ein av hinum nevndarlimunum formanssessin.

Framman undan hvørjum felagsfundi sigur formaðurin ella næstformaðurin frá møguligum fráverum.

Alt, ið órógvar fundin, verður átalað av orðstýraranum, ið hevur rætt til at vísa út tann ella teir, ið órógva og um tað gerst neyðugt, at slíta fundin.

Limirnir hava skyldu at hava loyviskort við, tá ið teir møta á fund, annars kann teim verða noktað atgongd.

Gr.18

Kassameistarin heldur umframt roknskap felagsins ein fullfíggjaðan lista yvir limir felagsins. Kassameistarin eigur at syrgja fyri, at roknskapurin í grannskoðaðum standi kann verða lagdur fram til góðkenningar á á ársaðalfundi í januar mánað.Kassameistarin skal ikki gjalda rokningar, uttan so at tær eru ávístar av formanninum (í hansara fráveru av næstformanninum).

Í kassanum eiga ikki at vera meira enn 2000 kr. í kontantum peningi.
Allur peningur, ið óneyðugur er at hava í kassanum, verður settur inn í peningastovnar í felagsins navni.
Peningur kann ikki verða tikin út av felagsins peningastovningabók, uttan av felagsins kassameistara í felag við formanninum, - í hansara fráveru næstformanninum. (Um so er, at bæði formaður og næstformaður eru fráverandi, kann kassameistarin í felag við tveimum nevndarlimum taka út úr peningastovnunum).
Limur, sum stendur í eftirstøðu við limagjaldi, eigur ongan rætt til skaða-ella streikuhjálp og líknandi.
Er talan um ivamál, má undir ongum umstøðum gjaldast meir enn munin á møguligum eftirstøðum og teirri peningaupphædd, hann annars hevði havt rætt til.

Gr.19

Skrivarin heldur fullfíggjaða gerðabók fyri allar fundir felagsins (eisini nevndarfundir) og brævaskifti.
Gerðabókin verður undirskrivað á hvørjum nevndar- fundi av teimum nevndarlimum á fundinum eru, og verður upplisin við byrjanina av fyrstkomandi nevndarfundi.
Viðvíkjandi nevndarfundum skal tað í gerðabókini verða greitt tilskilað, hvørjir limir, ið vóru á fundi og hvørjir høvdu givið avboð.

Gr.20

Roknskapargrannskoðarar og nevnd eiga til eina og hvørja tíð heimild til uttan ávaring at eftirkanna roknskap og kassapening.

Gr.21

Umframt vanliga grannskoðan av roknskapinum, skulu grannskoðarnir eisini ansa eftir, at felagsins ognir eru nýttar ella varðveittar samsvarandi við lógir felagsins.

**STJÓRNARVAL**

Gr.22

Val av nevnd og øðrum álitisstørvum skulu fara skrivliga fram.

Formaðurin verður valdur fyrst. Val av hinum báðum nevndarlimunum fer fram á tann hátt, at skrivað verða tvey nøvn á seðilin. Framkoma fleiri enn tvey nøvn við uppteljingina av atkvøðum, verða teir, ið flestar atkvøður hava, nevndarlimir, meðan teir, ið næstir eru í atkvøðum verða tiltaksmenn til nevndina. Minst ein tiltakslimur skal vera. Er eingin í uppskoti eftir vanligu reglunum um nevndarval, verður tiltakslimur valdur beinleiðis á fundinum.

Val av roknskapargrannskoðara fara fram á sama hátt.

Uppskot til formannsvalevni og uppskot til stjórnarvalevni skulu vera nevndini skrivliga í hendi í seinasta lagið kl 12 seinasta vanliga arbeiðsdag í desember árið fyri at formaðurin og stjórnarlimur stendur fyri vali. Saman við

uppskotinum skal vera váttan frá viðkomandi, at hann vil lata seg

stilla upp, umframt váttan frá 15 stillarum, sum skrivliga vátta, at

teir stiðja vidkomandi til formannsvalevni Stillararnir skulu

uppfylla treytirnar í grein 12 fyri at hava atkvødrætt. Um sitandi formaður ynskir afturval, nýtist honum tó ikki stillarar.

Saman við uppskotinum skal vera váttan frá viðkomandi um at hann seinastu 6 mánaðirnar hevur verið í arbeiðið innan sáttmálaøki felagsins, hevur verið virkin limur í felagnum og vil lata seg stilla upp. Valevnini skulu kunngerðast limunum í seinasta lagi í sambandi við fráboðan til aðalfundin.

Valevnini skulu kunngerðast limunum í seinasta lagi í samband við fráboðan til aðalfundin.

## ÁRSAÐALFUNDUR

Gr.23

Aðalfundurin hevur hægsta avgerðarrætt. - Einans hann kann geva, broyta ella avtaka lógir.

Vanligir aðalfundir verða fráboðaðir 2 vikur framman undan við lýsing í teimum í Tórshavn útgivnu vikubløðum og á annan hóskandi hátt, og uppskot ið ynskjast viðgjørd á hesum fundi, mugu vera latin formanninum í hendi innan 1.januar.

Dagsskrá fyri aðalfundin verður kunngjørd frammanundan.

Gr.24

Vanligur aðalfundur verður hildin í februar/mars, við hesi føstu dagsskrá.

1. Frágreiðing frá farna árinum.

2. Val av stjórnarlimum.a. Annahvørt ár: Ásetan av løn til formann og stjórnarlimir. Val av tveimum stjórnarlimum.

b. Annahvørt ár: Val av 2 stjórnarlimum og tiltaksmonnum til stjórn.

c. Fjórða hvørt ár fyrstu ferð 2023: val av formanni

d. Tiltaksmenn til stjórn verða valdir hvørt ár.

3. val av einum roknskapargrannskoðara, sum skal vera statsautoriseraður.

4. Ásetan av limagjaldi.

5. Ymist.

Uppskot,ið flíggjað eru formanninum til viðgerðar á aðalfundinum, verða at seta á dagsskránna frammanundan ymist.

Gr.25

Aðalfundurin er gildugur, tá ið 3 stjórnarlimir og 20 felagslimir eru møttir. Eru óv fáir limir møttir, skal lýst verða av nýggjum á sama hátt sum í gr 23. Hesin fundur hevur í øllum førum fullan avgerðarrætt. Aðalfundurin hevur rætt til at taka burtur, broyta og seta nýgjar lógir.

**EYKAAÐALFUNDUR**

Gr.26

Eykaaðalfundur kann verð hildin, tá ið nevndin heldur ta verða neyðugt ella í minsta lagi 25 limir seta fram skrivligt grundgivið krav um tað og møta á fundi.

**STJÓRNARFUNDIR**

Gr.27

Nevndarfundur verður hildin, tá ið formaðurin ella í minsta lagi 2 - tveir - nevndarlimir ynskja tað - tó skal nevndarfundur verða hildin minst eina ferð um mánaðin.

Fyri at nevndaravgerð kann takast, skal meira enn helvtin av nevndarlimunum vera til staðar.

Er ein limur burturstaddur frá 3 - trimum - fylgjandi nevndarfundum uttan at hava givið avboð, verður hann at roknað sum farin úr nevndini, og tiltaksmenninir verða boðsendir í tí rað, teir eru valdir.

**VERKFALL**

Gr.28

Nevndin kann seta í verk arbeiðssteðg (strike), og har avgerðin verður tikin við vanligum meiriluta.

Gr.29

Meðan arbeiðssteðgur (lockout ella strike) er, eru allir limirnir

skyldugir til við samanhaldi at styðja hvønn annan, soleiðis at eingin limur tekur við arbeiði á teimum arbeiðsplássum ella hjá teimum arbeiðsgevarum, ið arbeiðssteðgurin umfatar.

Eisini hava liminir skyldu til, um nevndin heldur tað verða neyðugt við vaktarhaldi og øðrum, at syrgja fyri, at verkfalli verður hildið so leingi arbeiðssteðgurin varar.

**AÐALVERKFALL**

Gr.30

Er arbeiðssteðgur (generalstrike), samtyktur av nevndini, er hvør ein limur skyldugur at leggja niður tað arbeiði, hann fæst við, tá ið arbeiðssteðgurin verður lýstur

**KÆRUMÁL**

Gr.31

Øll kærumál viðv. viðurskiftum hjá limum og tílíkum har talan er um brot á lógir ella sáttmálar, verða flýggjaðir skrivliga til formannin, og eiga at verða undirskrivað í minsta lagi av einum felagslimi (kærur við ongum navni undir eigur nevndin ikki at geva gætur, uttan við egnari ábyrgd), og letur nevndin síðani málið eftirkanna so væl sum gjørligt.

Allar frágreiðslur til vevndina viðv. teimum í 1.parti av hesi grein umrøddu viðgerðast sum loynimál.

**ROKNSKAPARÁRIÐ**

Gr.32

Roknskaparárið er álmanakkaárið.

**DEILDIR**

Gr.33 a) Tað er loyvt bilstjórum og bileigarum at gera deild innanfyri Havnar Arbeiðarafelag við teim reglum, sum samtyktar verða av felagnum.

b. Tað er loyvt brygjuarbeiðarum at gera deild innanfyri Havnar-Arbeiðarafelag við teim reglum, sum samtyktar verða av felagnum.

**FELAGSINS ENDALIGT**

Gr.34

Felagið kann ikki verða upployst, tá ið 10 limir við atkvøðurætti ynskja at tað skal halda fram.

Gr.35

Felagsins føstu ognir og peningur kunnu ikki verða býtt millum limirnar.

Gr.36

Verður felagið upployst, skal allur kontantur peningur setast inn í peningarstovnar í Tórshavn, har hann bert kann verða útafturtikin av einum felag innanfyri sama mark og við sama endamáli sum Havnar Arbeiðarafelag og hevur meira enn 100 limir yvir 18 ár. - Tó skal hetta felag hava virka í 5 - fimm - ár.

Somuleiðis verður gjørt við felagsins føstu ognir, ið við avtøkuna

verða latnar Tórshavnar býráð í hendi til at varðveita til tess at nýtt felag, ið uppfyllir tær í 1.parti av hesi gr. ásettu treytir, ger síni krøv galdandi.

Tó skal nýstovnað felag altíð eiga heimild til fundarhøli í húsum Havnar arbeiðarafelags.

Gr.37

Um so er, at eingin innan 15 - fimtan - ár áftaná at Havnar Arbeiðarafelag er upployst, hevur sett fram nakað eftir hesum lógum gyldugt krav um felagsins her umrøddu ognir ella pening, verður alt latið til hjálparkassan hjá Tórshavnar kommunu.

**LÓGARBROYTAN**

Gr.38

Broyting av hesum lógum kann einans verða gjørd á tí vanliga aðalfundinum í januar.

Til lógarbroytan krevst 3/4 meiriluti av møttum limum við atkvøðurætti.

Tá ið lógarbroytan er samtykt, skal hon sendast til prentingar innan 3 mánaðir áftaná.

**GILDI LÓGARINNAR**

Gr.39

Henda lóg kom í gildi 1.mars 1956 og er í gildi við teim seinri broytingum, sum eru prentaðar í hesi lóg, seinast broytt á ársaðalfundi felagsins tann 12.mars 2016

Tórshavn, hin 12.mars 2016

Hans S.B.Joensen form.

Jóhan Carl Dam

Martin Wennerstrøm

Heri Reynheim

Sakaris Hansen

**LÓGARBROYTING**

Lógarreglur fyri Arbeiðsloysisgrunn og Arbeiðsávísing Havnar Arbeiðarafelags strikaðar á ársaðalfundi 2.desember 1992.

Viðtikið á aðalfundi 2. desember 1992.

Nevndin

Carl Johansen form.

Kristoffur Joensen

Andreas Debess

Kristian Joensen

John Eysturoy

---------------------------------------------------------------

## LÓGARREGLUR FYRI VERKFALSGRUNN HAVNAR **Arbeiðarafelags**

Gr. 1

Endamálið er at veita limum Havnar Arbeiðarafelags stuðul undir arbeiðsstøðgi, - verkfall ella lockout. Støðgurin má vera góðtikin av Havnar Arbeiðarafelag.

Gr. 2

Peningur grunsins verður settur í peningastovnar í felagsins navni. Grunnurin hevur serstakan roknskap, so sum øll inn-og útgjøld verða bókað.

Gr. 3

Tá ið arbeiðssteðgur er - verkfall ella lock out -, fáa teir limir felagsins, ið eru í verkfalli, stuðul úr verkfals- grunninum. Stuðul verður latin frá og við 2 (øðrum) degi frá tí at verkfallið byrjar. Tó kann nevndin avgera at stuðul verður goldin beinanvegin, tá talan er um verkfall, sum ikki hevur við sáttmálarnar at gera.

Upphæddin á stuðlinum, sum latin verður, verður at leggja undir nevndina.
Peningur ið ikki er heintaður seinast 7 dagar aftaná útgjaldsdag, fellur aftur til grunnin.

Gr. 4

Bert tey, sum vóru limir í felagnum tá arbeiðs- steðgurin varð settur í verk, hava rætt til stuðul.

Gr. 5

Meðan verkfall er, lata teir limir felagsins, ið ikki eru í verkfalli, 10% av løn síni í verkfalsgrunnin.

Henda grein verður tó at seta í gildi eftir stjórnarinnar avgerð.

Gr. 6

Í øllum ivamálum tekur stjórnin avgerð í tráð við lógir Havnar Arbeiðarafelags.

Soleiðis samtykt á ársaðalfundi tann 29.des.1957 og endursamtykt á eykaaðalfundi tann 6.mars 1958, og er í gildi við seinni gjørdu broytingum seinast á ársaðalfundi felagsins tann 29. mars 2014

Nevndin

Hans Joensen form.

Jóhan Carl Dam næstf.

Martin Wennerstrøm

Heri Reynheim

Sakaris Hansen